eg sá ikki ein tann einasta hvíta fugl. Tað er ikki gott tekn.

## Mið og plinkar

Plinkar og mið havi eg mestsum í høvdinum. Eg havi ongantíð skrivað nakað upp, men fór eg at rokna upp, hevði tað uttan iva verið 100 mið. Tá komið verður fram á ein plink, har fiskur er at fáa, so minnist ein til tað. Tað er ymiskt, sum mann kann fáa á hvørjum plinki. Tað sum bátar ofta gera, er skeivt. Teir leggja seg á miðið, tá ið tað rekur hart. Tá tað so kemur til fiskirák er miðið farið framvið. Tá tað vóru árabátar, løgdu teir ikki fyrr enn tað var fiskirák.

Teir høvdu eisini so smáar línuleypar, tí línan var fín. Vit høvdu so sera fínar greiðir, tær vóru ongatíð ov fínar. Tær fiskaðu so nógv betri.

Tað hava verið nógvir plinkar uppi við Eystnesi, Hvítanesi og Flesjarnar, sum eru oyddur av, at ov nógv er fiskað. Her var so lítið øki, og bátarnir vóru nógvir, so tað var skjótt at gera bart.

Nú verður tosað um at friða innaru leiðirnar fyri alla veiðu fyri at verja toskin. Sjálvur haldi eg, at tað er fyri línuveiðu friðast skal. Snelluveiða er rættiliga meinaleys í mun til línuna, sum er sera effektiv, tá ið lítið er av føði í sjónum.

## Tað ber til at forvenja fisk

Viðvíkjandi agni er tað soleiðis, at eg havi ongantíð egnt gággu, men nú fáa teir einki uttan við gággu. Men tað ber eisini til at forvenja fisk.

Vit lógu einaferð við Eystnes, tað var nógvur fiskur har uppi. Vit fingu uppí eitt lítið fýramannafar. Vit brúktu bara sild, men teir úr Kaldbak høvdu gággur og øður. Men tá skuldu vit ikki bjóða til at fara aftur. Vit fingu púra einki. Fiskurin var blivin vandur til bert at taka øðu. Høvdu allir roynt við sild, hevði veiðan vist verið góð kortini.

Eitt annað fyribrigdi er, at har tað hevur verið roynt við línu, nyttar einki at koma beint aftaná við snøri ella snellu.

## Havi ikki fiskað sunnudag

Sjálvir havi eg ongantíð fiskað sunnudag, tá eg havi havt fartøj sjálvur, men væl hevur kortini borið til. Tað var strævið at rógva út, men eg royndi altíð at vit skuldu sova seks tímar.



*Sigrid var dóttir Inger Müller og seinra mann hennara Tummas. Maður Sigrid var Johannes Sigurd og eru tey omma og abbi Sigurd Danielsen, sum var giftur við Nenu, sum er ein kelda til hesa grein*

## Framúr veðurmaður

Eg minnist ikki nakran serligan dramatiskan útróðrartúr. Men einaferð skuldu vit fara avstað og ætlaðu okkum norð um Mykines. Eg lurtaði eftir veðurforsøgnini, og tá var tað eftir veðurmanninum á flogvøllinum. Hetta var ein dani sum æt Orla. Hann var so framúr gløggur, og dugdi væl at boða frá veðrinum sum kom.

Hann sigur tá frá fullum stormi á midnátt. Tá skuldi vindurin koma. Tað var lítið av fiski sunnanfyri Mykines, men tað var nógvur fiskur norðanfyri. Vit mettu, at vit fóru at fáa mótvind út, men undanvind heim aftur. So vit fóru at seta. Tað var eingin tíð at spilla, so vit seta við nógvari ferð. Vit settu í ein runding, so tað seinasta vit settu, var inni í rundinginum. Eingin annar bátur var har á leiðini. Annars er tað ikki gott at seta við nógvari ferð, tí tað styggir fisk. Vit kastaðu seinastu boyuna, fingu okkum ein drekkamunn og fóru so at draga beinanvegin. Vanliga gekk ein tími, áðrenn lagt varð á at draga aftur. Fiskurin skal hava tíð til at taka. Tað er eisini eitt sindur ymiskt við tí. Hýsa tekur skjótari enn toskur. Tað var fiskur á hvørjum húki í tí seinasta vit settu. Eg haldi, at fiskurin hevur givið seg undan bátinum inn í rundingin, tá vit settu. Á tí, vit drógu seinni, var minni á, men tað var framvegis væl av fiski. Á midnátt høvdu vit tríggjar stampar eftir at draga, tá fingu vit enda. Tá mátti siglast eftir eini miðju, vit fingu tó restina av línuni kortini, og koyrdu inn ímóti Mykinesi. Vestfallið rak hart tá móti streyminum. Men undir Mykinesi fingu vit suðurrákið innanfyri og komu so á Núgvunes og fóru tætt at landi. Vit fingu okkurt brotið, men komu aftur í øllum góðum. So tað bleiv ein góður túrur hjá okkum.

Tað skal eisini sigast, at Petur Skeel roynist eisini væl sum veðurmaður. Hann kenni eg eisini væl frá Sundi. Hann er kaldbaksmaður, hann er nakað yngri enn eg. Tað var tó so mikið av sambandi millum bygdirnar, at fólk kendust. Systur hansara Poula giftist annars við systkinabarni mínum Jákup Apol.



*Fyrsta kaparafarið hjá Mikkjali »Røver Fienden«, t.h., var til støddar sum eitt 10-mannafar. Mikkjal sæst standandi afturi í skut við kikara. Málningur frá 1808*

## Hýsa er løgið fyribrigdi

Eitt merkiligt fyribrigdi er hýsa. Andreas í Tarti greiddi frá í FF-blaðnum, hvussu teir róðu út í 20-unum, og onkran vetur ikki fingu so mikið sum eina hýsu. Men eg kann minnast sum smádrongur, hvussu bátar kundu fiska uppí í Hvíthavinum, sum vit kalla grunnarnar sunnanfyri Flesjarnar. Teir seldu hýsuna í Vágsbotni í Havn. Hetta var bert heilt smá hýsa, ongantíð stór hýsa. Toskur hevur verið burtur til tíðir. Tað kann alt hava samband við hitan í sjónum. Tað sigst, at tað nú verður lýggjari. Hetta fer kanska at merkja at onnur fiskasløg fara at koma hendan vegin.

## Kendi væl Pól á Nesi

Eitt árið vóru vit út fyri Saksun. Vit høvdu sett kalvalínu, vit drógu eina hálva línu og høvdu næstan einki fingið, kanska onkra spraggu. Tá rópar Pól av Trøllanesi á Tindi á okkum og spyr, hvussu tað gongst. Eg svari aftur sum er, at vit hava drigið helvtina, men hava einki fingið. Men tá byrjaði at bragda, og vit fingu ein góðan dag. Hann lúrdi uppá, at um vit fingu, so hevði hann eisini sett. Hesa ferðina hevði hann helst fingið meira burtur úr við ikki at lurta eftir okkum. Hevði Pól spurt seinni hevði hann eisini fingið at vita, at vit høvdu gott fiskarí.

Eg kendi annars væl Pól. Tað lá væl fyri at fiska hjá honum, hann var ein stak fittur maður. Tá vit lógu inni plagdu vit at fara umborð hjá hvørjum øðrum.



*Kalvarnir eru stórir. Jakku er her saman við syskinabarninum Jákupi Apol*

**Næstu ferð: Gimmi**

Í seinasta parti komandi mikudag fara vit millum annað at hoyra meira um Gimma og onnur í ættini